**AVRIKSSÁTTMÁLI**

**millum**

| | | |
|---|---|---|
| **Klaksvíkar kommunu** | | **Felagið Spaniastova** |
| **Nólsoyar Pálsgøtu 32** | **og** | **v/Jógvan A. Joensen** |
| **Postboks 2** | | **Klaksvíksvegur 86** |
| **700 Klaksvík** | | **700 Klaksvík** |

## Inngangur

Seinastu árini hevur felagið Spaniastova, við Jógvani Andriasi Joensen sum stigtakara og samskipara, ríkað tað søguliga áhugaverda umhvørvið úti í Klaksvík við at skipa fyri fleiri mentanartiltøkum og tilboðum til allar borgarar.

Til tess at styrkja hesa tilgongd og harvið geva borgarum í Klaksvíkar kommunu og føroyingum øllum enn fleiri og betri mentanarupplivingar við fleiri mentanartilboðum í tí spennandi umhvørvinum í og kring Klaksvíksgarðin, verður hesin avrikssáttmáli gjørdur millum omanfyri nevndu partar.

## Staðseting

**§ 1**

Hesin avrikssáttmáli snýr seg um fyriskipan av mentanarligum tiltøkum, framførslum og upplivingum í og út frá Spaniastovu og uppatliggjandi hølum, sum felagið Spaniastova v/Jógvan Andrias Joensen – ið er eitt sjálvstøðugt felag við egnum v-tali, nummar 630810, og roknskapi – leigar frá Norðoya Fornminnissavni.

Nevnda leigumál er ikki partur av hesum avrikssáttmála, men er og verður framhaldandi at avtala millum felagið Spaniastova og Norðoya Fornminnissavn.

## Longd avrikssáttmálans

**§ 2**

Hesin sáttmáli kemur í gildi 1. apríl 2018 og heldur fram í 5 ár, til 31. mars 2023. Eftir hetta verður uppsagnarfreistin hjá báðum pørtum 6 mánaðir til eitt ársskifti. Partarnir eru tó samdir um at miða ímóti, at sáttmálin skal halda fram eftir nevnda tíðarskeið, og hann heldur tí óbroyttur fram við teimum í hesum skjali avtalaðu treytum, um ikki annar parturin ger brúk av sínum uppsagnarmøguleika.

**Gjald**

**§ 3**

Sum stuðul fyri tey tiltøk, framførslur og upplivingar, sum felagið Spaniastova sambært hesum sáttmála skipar fyri, rindar Klaksvíkar kommuna eitt árligt gjald, sum verður goldið á kontu hjá felagnum Spaniastova mánaðarliga forút, fyrstu ferð 1. apríl 2018.

Støddin á árliga gjaldinum verður eftirmett og ásett fyri eftirfylgjandi árið á einum árligum fundi millum partarnar í oktober mánað, fyrstu ferð í oktober 2018.

Á hvørjum ári letur felagið Spaniastova inn grannskoðaðan ársroknskap, saman við eini frágreiðing og yvirliti yvir virksemið undanfarna árið, sum verður latin Klaksvíkar kommunu í seinasta lagi á árliga fundinum partanna millum í oktober mánað.

Fyri árið 2018 (tríggjar ársfjórðingar) verður upphæddin sett til Kr 397.500, svarandi til Kr 530.000 heilárliga, og verður miðað ímóti framhaldandi á leið somu árligu upphædd.

Hóast ásetingina í § 2, hava partarnir avtalað, at um munandi broytingar eru í grundarlagnum undir sáttmálanum, herundir tí fíggjarliga grundarlagnum, kunnu báðir partar krevja, at tingast verður av nýggjum um innihaldið í sáttmálanum.

**Tiltøk**

**§ 4**

Fyri tað árliga gjaldið frá Klaksvíkar kommunu bindur felagið Spaniastova seg til at skipa fyri hesum árligu tiltøkum:

- 12 konsertir í og kring Spaniastovu
- 3 evnisdagar
- 5 framførslur, sjónleikir og líknandi í og kring Spaniastovu
- Ymiskir fyrilestrar, skeið, temakvøld við meira

Somuleiðis bindur felagið Spaniastova seg til at leggja hús til møguligar móttøkur, tíðindafundir ella líknandi hjá Klaksvíkar kommunu, tó ongantíð meiri enn 5 um árið. Kommunan verður tá at rinda tær útreiðslur, ið standast av nevndu móttøkum v.m.

Tal og samanseting av árligum tiltøkum verður eftirmett og ásett á einum árligum fundi millum kommununa (Mentanardeildina) og felagið Spaniastova í mars mánað, fyrstu ferð í

mars 2019. Harumframt hava partarnir kvartárliga uppfylgjandi støðufundir, sum eru í juni, september og desember.

Umframt omanfyri nevndu tiltøk stendur tað felagnum Spaniastova frítt at fyriskipa og samskipa onnur mentanarlig tiltøk, framførslur og upplivingar eftir egnum ynski og stigtøku, bert hesi eru í tráð við yvirskipaða endamálið við hesum avrikssáttmála, sum er at geva borgarum í Klaksvíkar kommunu og føroyingum øllum góðar mentanarupplivingar og mentanartilboð.

**Undirskriving**

**§ 5**

Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í 2 eintøkum, soleiðis at Klaksvíkar kommuna og felagið Spaniastova fáa hvør sítt eintak.

***Klaksvík, 8. mai 2018***

***Klaksvíkar kommuna***
***Nólsoyar Pálsgøta 32***
***700 Klaksvík***

*Jógvan Skorheim*
*Borgarstjóri*

*Tummas T. Eliasen*
*Kommunustjóri*

***Felagið Spaniastova***
***v/Jógvan Andrias Joensen***
***700 Klaksvík***

*Jógvan Andrias Joensen*

FYLGISKJAL:
LØGFRØÐILIGT NOTAT FRÁ JÓAN HENDRIK SVABO SAMUELSEN, LØGFRØÐINGI KOMMUNUNNAR

## Notat Spaniastova.

Ætlanin er at gera ein (Avrikssáttmála) við Jógvan Andrias Joensen, leiðara av Spaniastovu. Spaniastova hevur gjøgnum langa tíð fyrireika mentunnartiltøk í Klaksvík.

**Avrikssáttmáli**
Avrikssáttmáli verður aloftast gjørdur millum eitt Aðalráð og undirliggjandi stovnar ella t.d innanhýsis á stovninum t.d. kommununan avrikssáttmála við t.d teknisku deild.

Avrikssáttmálin er oftast ein ætlan hvat deildin/stovnurin setur sær sum mál komandi árið, hvat visjónin er, og hvar áherðslan verður løgd á, fyri tíðarskeiðið avrikssáttmálin er galdandi.

**Dømir**
T.d. hevur Fíggjarmálaráðið og TAKS ein mál-og avrikssáttmála Almannamálaráðið og Almannaverkið ein avrikssáttmála osv.

Sum eg lesi hetta konseptið ætlar KK at gera ein sáttmála við Spaniastovu, galdandi í 3ár. Endamálið er at styrkja Spaniastovu sum mentunnardepil. Ein orsøk til, at nman júst hevur valt Spaniastovu er, at har longu frammanundan er nógv mentunnarvirksemið.

Talan er um eina upphædd uppá kr. 300.000 árliga.

**Løgfrøðiligar viðmerkingar**
Hugtaksmessiga sæð, meti eg at vit tosa um ein (vanligan) sáttmála, ikki avrikssáttmála, og tann sáttmálin hevur so nakrar ásetingar/treytir.

Málið í eini "nøddeskal" er, at KK vil hava mentunnarøkið uppraðfest, í hesum sambandi er metingin er eitt gott boð er, at gera ein sáttmála við Spaniastovu sum frammanundan hevur nógv áhugavert mentunnarvirksemið.

**Kommunurætturin**
Kommunerne har tradionelt kunnet varetage eller støtte aktiviteter af kulturel karakter inden rammerne af kommunefuldmagten. kulturelle formål forstås i denne sammenhæng bredt. Der sigtes til klassiske kulturaktiviteter som teater musik, muséer o.lign. og til mere alternative aktiviteter sum f.eks. bogcaféer. I forbindelse med kulturrelle formål behandles også støtte til undervisning og forskning. (.Revsbech s.363).

Der er en lang og fast tradion for, at understøttelse af enkeltpersoner ikke kan ske indenfor rammerne af kommunefuldmagten. Begunstigelse af enkeltpersoner kræver lovhjemmel.(Revsbech s.84)

**Kjak**
Eg hugsi her er neyðugt at gera okkum greitt, hvat er tað sum verunliga hendir.

Tað sum eg meti hendir er, at KK ætlar at uppraðfesta mentananina (mentanadepilin). Kommunan velur tí at fara út at keypa eina tænastu, sum longu er til staðar í býnum. Vit tosa ikki um, at gera eitt nýtt øki,sum allir borgarar í kommununi í prinsippinum skuldu havt møguleika at boði inntil, tí talan er eisini um eina rímiliga stóra pengaupphædd. Spurningurin er eisini um hendan uppraðfesting skal bjóðast út, so allir borgarar í kommununi fáa møguleika at bjóða inn.

**Mentunnargrunnur**
Hevði talan verið um ein stuðul úr einum mentunnargrunni var hópin lættari, í so máta. Ein lýsing stóð í bløðunum um møguleikan at søkja og so ein Umsóknarfreist verður lýst. Øll kunnu søkja og so avgerð leiðslan í viðkomandi grunni, hvør skal hava stuðul.

**Fyrisitingarmál**
Nú tosa vit um eitt fyrisitingarmál. Umsitiningin kemur við einum tilmæli til mentunnarnevndina. Eitt tilmælið kemur frá umsitingini um at gera sáttmála við Spaninastovu við einum gjaldið kr. 300.000,- árliga.

Í hesum føri tosa vit um eitt reint fyrisitingarmál, og í tí viðgerðini er fyrisitingarlógin galdandi. Fyrisitingin leggur eitt mál fyri mentunnarnevndina og sum so viðgerð málið á vanligan hátt.

**Útbjóðing**
Spurningurin um útbjóðing er eisini áhugaverdur.

Eg kundi spurt retoriskt aftur, hvat skal bjóðast út- ein uppraðfesting av virkseminum í Spaniastovu? Tað ber nokk ikki til.

Men hevði senariið verið t.d., at mentunnarvirksemið í mentunnardeplinum(gamla posthúsið) skal uppraðfestast í 2016 og vit seta kr. 300.000,- til uppgávuna, so kundi tað verið bjóða út, tí tað er so mikið konkret, at tað ber til at bjóðast út.

Um hetta var senariið, so ivist eg ikki í, at tað skuldi bjóðast út. Jógvan Andraias kundi ikki fingið uppgávuna bert eftir avgerð frá mentunarnevndini, tí tað hevði eftir míni meting, verið brot á líkheitsgrunnsetningin. Men Jógvan Andrias er sjálvandi altíð vælkomin at bjóða uppá uppgávuna, á líka fóti við hinar borgarnar í kommununi.

Í hesi avgerðini er ein raðfesting. Kommunan ger innan kørmunum av kommunafullmaktini, eina raðfesting (keyp av tænastu).

Kommunan velur at stuðla Spaniastovu, sum hon metir er besta boðið uppá eina uppraðfesting av mentunnarøkinum, beint nú.

Tað sum er avgerandi løgfrøðiliga er, at kommunan heldur seg innanfyri sítt málsræði (kommunufullmaktin) og ikki fremur brot á líkheitsgrunnsetningin um at stilla allar borgarar í kommununi líka. Í báðum førum heldur kommunan seg innanfyri lógarinnar karmar.

Viðmerkjast skal eisini her, at undirritaði metur heldur ikki, at hetta er eitt brot á Rundskrivið, sum er komið frá Fíggjarmálaráðnum: Um keyp av vørum og tænastum Tí talan er um eina uppraðfesting av einum málsøki hjá kommununi, og ikki eina útbjóðing.

**Niðurstøða**
Eg meti ikki at tað er ímóti regluverkinum at gera ein sáttmála við Spaniastovu, áljóðandi hasa upphæddina. Hetta byggi eg á kommunurættin, tað liggur innan fyri kommunal-fullmaktina at stuðla mentunnartiltøkum.

Eg meti heldur ikki talan er um stuðul til einkultpersónin, Jógvan Andrias Joensen, sum jú ikki er lógligt.

Tað vildi tað verið, um so var, at Spaniastova v/Jógvan Andrias Joensen onki virksemið hevði frammanundan. Um so var,hevði eg ikki ivast í at tað var ólógligt. Tí talan var um stuðul til einkultpersón uttan lógarheimild.

Tað sum hendir í hesum málinum er at kommunan velur at stuðla einum mentunarvirksemi í kommununi, og tað er eftir bókini smb. kommunurættinum.

Kommunan velur at stuðla einum kendum og viðurkendum mentunnarvirksemið í býnum, og fyri at geva tí enn betur møguleika, velur kommunan at stuðla tí virkseminum við einum sáttmála. Undir hvørjum treytum, stuðulin verður veittur, og hvussu hann verður útgoldin, vildi mett rætt var við í sáttmálanum, og at tað eisini í sáttmálanum stóð, at Spaniastova kom við eini frágreiðing um hvussu stuðulin var nýttur og til hvat, møguliga ein roknskap eisini.

Undirritaði metur tí, at fyrisitingarliga er fari rætt fram í hesum málið.

JHSS/15.01.2016